# Ford S-MAX og Galaxy







*Ford S-MAX er annar av bilunum sum verða framleiddir á eini felags verksmiðju í Belgia. Bilurin varð fyrstu ferð sýndur fram í fjør sum konseptbilur undir navninum Ford SAV*






*Ford Galaxy avloysir núverandi Galaxy, sum higartil hevur verið gjørdur í Portugal saman við VW Sharan og Seat Alhambra*





**ELLISAKFAR TIL SØLU**
Volvo 144. 4 hur›ar (grønur). Bilurin er skrásettur fyrstu fer› í 1971. Hevur bert havt tveir eigarar. Áhuga›i eru vælkomin at venda sær til.
**Tel. 213727**

- Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
- Vit umvæla øll bilmerki
- Klárgering til sýn
- Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

**Sp/f Plátuverkstaðið**
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo


**Í ár koma tveir heilt nýggir Fordar á marknaðin, talan er um S-MAX og Galaxy, ið verða gjørdir á eini felags verksmiðju í Belgia**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Síðan konseptbilurin Ford SAV fyrstu ferð varð sýndur fram, á altjóða bilframsýningini í Genéve í fjør, hevur verið gitt um, hvønn bil hann skal avloysa ella um talan er um eitt nýtt sjálvstøðugt modell.

Nú er so endalig avgerð tilkin um, at bilurin, sum í stødd er millum Ford C-MAX og Ford Galaxy, skal eita Ford S-MAX, og at hann verður gjørdur á eini nýggjari verksmiðju í Belgia saman við Ford Galaxy.

Hóast navnið bleiv til Ford S-MAX, er bilurin ein sonevndur SAV (Sports Activity Vehicle). Hetta merkir, at talan er um ein praktiskt innrættaðan bil við sportligum koyrieginleikum, ið kann nýtast til nógv ymisk endamál,

Bilurin kemur eftir ætlan á marknaðin í summar við sitiplássum til fimm vaksin og møguliga eisini tveimum barnasetrum á aftastu røð.

Ford S-MAX fæst við tveimum bensinmotorum: 2,5 litur turbo við 220 hk og 2,0 litur við 145 hk, og tveimum dieselmotorum: 1,8 litur við 125 hk og 2,0 litur við140 hk.dieselmotor.

## Galaxy

Ford arbeiða eisini við einum øðrum bili, ið skal framleiðast í Belgia. Hesin verður avloysarin fyri Ford Galaxy, ið higartil hevur verið gjørdur í Portugal saman við VW Sharan og Seat Alhambra – hetta samstarv er nú hildið uppat.

Talan er um ein bil, sum er eitt sindur størri enn S-MAX. Bilarnir líkjast heilt nógv, men Galaxy verður ein 7-persónabilur við stórum viðførisrúmi. Hesin fær í fyrstu atløgu ein 2.0 litur bensinmotor við 145 hk, og tveir dieselmotorar við ávikavist 100 og 140 hk verða eisini á skránni.